## Sveis lovar hevnd

Fær sveisiski tjóðskaparflokkurin sín vilja, skal tað koma USA aftur um brekku, at landið hótti Sveis fyri at fáa atgongd til konti í størsta sveisiska bankanum UBS. Undanfarna stjórnin í Washington legði stórt trýst á Sveis fyri at fáa atgongd til upplýsingar um amerikanarar, sum høvdu sett pengar á bók í USB uttan at kunna skattavaldið um tað. Endin var, at Sveis slakaði. Nú hevur USA spurt, um Sveis kann taka ímóti nøkrum fangum úr Guantanamo, men nú vil Tjóðskaparflokkurin hava Sveis at siga kortanei.



## Brown til Washington

Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, skal hitta amerikanska forsetan, Barrack Obama, í Washington tann 3. mai. Brown er fyrsti útlendski stjórnarleiðarin, sum viotjar Obama. Í einari fráboðan úr Hvítu Húsunum stendur, at teir báðir fara millum annað at tosa um altjóða fíggjarkreppuna og støðuna í Afghanistan. Eygleiðarar rokna við, at teir skulu eisini umrøða 60 ára hátíðarhaldið hjá NATO, sum verður í vár. Tá verður millum annað ein serligur hátíðarfundur í Strasbourg.

## Leita eftir vitnum

**Eitt ógvusligt harðskapsmál var í Havn um vikuskiftið. Tveir mans og ein kvinna høvdu bankað ein mann so illa, at hann mátti á sjúkrahúsið. Løgreglan sóknast eftir vitnum til tilburðin**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Eittóhugnaligtharðskapsmál var í Steinatúni tíðliga leygarmorgunin. Ein kvinna og tveir mans bankaðu ein mann so illa, at hann varð sendur á sjúkrahúsið við bløðingum á høvdinum. Maðurin fekk ógvusligar snuddur í høvdið, og hevur brotið í øllum førum tvær tenn av tilburðinum.

Løgreglan kannar málið, men teir standa mest sum á berum enn.

- Vit eru enn í kanningarfasuni, og vit vita ikki, hvør hevur framt henda harðskapin. Sum heild vita vit ikki tað heilt stóra í hesum málinum, annað enn at tann eini brotsmaðurin var í einari hvítari hettutroyggju, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

Løgreglan leitar framvegis eftir vitnum til tilburðin, og fólk, ið møguliga vita okkurt til framda harðskapin ella umstøðurnar kring hendingina, kunnu venda sær til løgregluna við upplýsingunum.



*Løgreglan leitar eftir vitnum til harðskapsmálið í Steinatúni. Tann eini harðskapsmaðurin var í einari hvítari hettutroyggju, men lítið annað veit løgreglan enn*

# Langaði fløsku í høvdið



*Ein ungur drongur langaði eina fløsku í høvdið á einum øðrum ungum drongi, tá teir vóru farnir til hendurs uttanfyri TB húsið sunnunáttina*

**Á Tvøroyri vóru tveir ungir dreingir farnir til hendurs sunnuáttina. Annar drongurin langaði eina fløsku í høvdið á hinum, sum mátti undir læknahond**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Náttina til sunnudag klokkan 01.20 fekk løgreglan í Suðuroy eina fráboðan um harðskap.

Tað vísti seg at verða tveir ungir dreingir, um 16 og 17 ár, ið høvdu verið í hornatøkum uttanfyri TB húsið, har dansur var.

Tá báðir unglingarnir vóru í hornatøkum, gjørdi annar ikki mætari enn at langa eina fløksu í høvdið hinum.

Slagið tók somikið fast, at hann, ið fekk fløskuna í høvdið, noyddist undir læknahond at seymast. Hann fekk fýra pentur.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Suðuroy greiðir frá, at teir hava verið í samband við dreingin, ið langaði fløskuna í høvdið á hinum, og at hann verður ákærdur fyri harðskap. Hann er frammanundan kendur hjá løgregluni í Surðoy.

# Festi í av sær sjálvum

**Sunnumorgunin var eldur í einum bili á Tvøroyri. Løgreglan kannar málið, og higartil bendur alt á at talan ikki er um kriminalitet**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Sunnumorgunin fekk løgreglan í Suðuroy eina fráboðan um at eldur var í einum bili á Tvøroyri.

Tað var ein hýruvognsførari, ið hevði lagt til merkis, at tað reyk inann úr einum vøruvogni, ið stóð parkeraður.

Sløkkiliðið kom á staðið og fekk sløkt, áðrenn bilurin veruliga brendi.

- Tað vísir seg at tað er ein timburmaður, ið eigur henda bilin. Roykurin kom úr einum stórum fiskakassa, ið stóð aftan í bilinum, har hann hevur havt ymiskt liggjandi í, og nógv bendir á at har er okkurt, sum hevur fest í av sær sjálvum, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Suðuroy.

Løgreglan metir ikki at talan er um kriminalitet, men teir kann framvegis málið til tess at fáa staðfest, hvussu eldur kom í.



*Eldur var í einum fiskakassa í einum vøruvogni á Tvøroyri sunnumorgunin. Nógv bendir á at tað er fest í av sær sjálvum millum restirnar, sum lógu í kassanum*